einfaldari

- ger tað einfaldari

Apríl 2011

# Durita og Pauli í Kyrgystan



*Genta í Kyrgyzstan við eini skógvaeskju frá Samaritan's Purse* *Mynd: Pauli Djurholm*

Durita og Pauli Djurholm vóru í Kyrgyzstan frá 17. til 25. mars saman við kristna hjálparfelagsskapinum Samaritan's Purse, sum m.a. stendur fyri Operation Christmas Child (OCC). Miðasiatiska landið Kyrgyzstan var partur av fyrrverandi Sovjetsamveldinum.

Endamálið við túrinum var at síggja, hvussu arbeiðið hjá OCC fer fram, og hvønn mun tað ger at vera við í hesum arbeiði.

"Tað var stórt at síggja, hvussu seriøst arbeiðið hjá Samaritan's Purse er, og hvussu væl alt er skipað saman við lokalum samkomum í Kyrgyzstan. Neyðin er stór í hesum muslimska landinum, har almenna arbeiðsloysi er 70 prosent. Vit ferðaðust í norðara partinum av landinum og vitjaðu barnaheim, skúlar, sjúkrahús, fátækar bygdir og eina politistøð.

Vit gleðast um at síggja, hvussu vit kunnu gera mun við at hjálpa. Vónandi verða enn fleiri gávur givnar úr Føroyum komandi árini. Møguleiki er eisini at stuðla arbeiðnum hjá Samaritan's Purse á annan hátt við t.d. bøn, peningaligum stuðli og við at gerast samstarvspartnarar í eini verkætlan, eini samkomu ella Kyrgyzstan sum heild," siga Durita og Pauli Djurholm.

lívdin
– í lívd hins hægsta

Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

### Hann hevur elskað okkum

”Í hesum er kærleikin: Ikki at vit hava elskað Gud, men at Hann hevur elskað okkum og sent Son Sín til bót fyri syndir okkara” (1 Jóh. 4:10). Páskini minna okkum á, at Kristus doyði fyri at geva menniskjum lív. Hann doyði fyri at føra menniskju frá myrkrinum inn í ljósið. Hann doyði fyri at geva menniskjum rættvísi Guds. Hann doyði fyri at geva menniskjum frið við Gud. Hann doyði fyri at geva menniskjum nýtt hjarta, nýtt sinni og nýggjan vilja. Hann doyði fyri at geva menniskjum fyrigeving. Á tann kærleiki! Máttu hesir sannleikar gripið okkum hesar páskirnar.

*Jógvan Zachariassen*

## HENDINGAR & TILTØK

### Tom Roberts í Føroyum



*Tom Roberts talar í Lívdini*
*Mynd: Tórvør Vang*

Kendi prædikumaðurin Tom Roberts vitjar í hesum døgum í Føroyum og talaði í Lívdini sunnudagin 27. mars.

Tom Roberts kom higar fyrstu ferð í 1973, tá ið hann ferðaðist kring oyggjarnar við sínum greiða og máttmikla evangeliska boðskapi. Sonn veking tók seg upp, og tað sama hendi, tá ið hann kom aftur í 1976. Síðani hevur hann verið fleiri ferðir aftur, seinast fyri fimm árum síðani, og hvørja ferð hevur hann borið við sær eitt lívgandi vindblak av andaligari signing, sum hevur nomið mangt hjarta í Føroyum.

Tom er føddur og býr á Bahamaoyggjunum, har hann í meira enn 50 ár hevur virkað sum evangelistur. Hann hevur ferðast nógv í Amerika, eins og í mongum londum í Eystur- og Vesturevropa. Hóast hann nú er 75 ára gamal, er hann framvegis ein líka fúsur, dynamiskur og hugvekjandi boðberi evangeliums, sum áður. Kona hansara, Lesa, er við honum í Føroyum, og móti endanum av vitjan teirra kemur ein dóttir teirra við fýra børnum at vitja, og fylgjast tey øll heim aftur 2. páskadag.

### Serstøk páskamøti í Lívdini

Jógvan Zachariassen og Poul Guttesen fara við fleiri av tónleikarunum og listafólkunum í Lívdini at leiða samkomuna gjøgnum alla páskavikuna á ein kreativan og autentiskan hátt.

Vit fara at ganga í fótasporum Jesusar, frá tí hann reið inn í Jerúsalem pálmasunnudag, til hann reis upp frá deyðum páskamorgun. Hetta verður gjørt við hugleiðingum, lovsongi, solosongi, drama, dansi og málningum. Sí skrá.

Mánakvøldið, týskvøldið og mikukvøldið verður í hølunum Oman Hoydalar, og tær løturnar vara bert ein tíma.

Hóskvøldið verður í Skúlanum við Løgmannabreyt, og har fara Jógvan og Poul at greiða frá hvussu kvøldmáltíðin upprunaliga gekk fyri seg. Tað, sum verður spennandi, er, at teir fara at gera tað rundan um eitt borð við 13 fólkum, á sama hátt sum Jesus gjørdi saman við lærisveinum sínum. Breyðbróting verður eisini hóskvøldið.

Fríggjakvøldið tosa teir um krossfestingina, samtíðis sum søgan verður fortald við málningalist, dansi og tónleiki. Sunnumorgunin verður serligur dentur lagdur á, at Jesus livir, og møtið kemur at eyðkennast av gleði og lovsongi. Vónandi møta fólk fjølment.



### Móttøka og opið hús

Á leguni á Zarepta gjørdist greitt, at samkoman ynskti, at skipað varð fyri "housewarming" ella líknandi tiltaki í húsunum Oman Hoydalar 28.

Avgjørt er, at fríggjadagin 8. apríl kl. 15 – 18 verður ein móttøka í húsunum Oman Hoydalar 28. Ætlanin er, at øll samkoman skal kunna koma fyri at síggja húsini, hoyra hvørjar ætlanir eru við ymsu hølunum og spyrja spurningar. Ætlanin er eisini at bjóða grannunum innar at síggja húsini og møta samkomuni.

### Navnakapping

Finnast skal eitt hóskiligt navn til húsini Oman Hoydalar 28, og tí hava vit skipað fyri eini innanhýsis navnakapping í Lívdini. Heitt verður á øll í samkomuni um at koma við uppskoti til eitt gott navn til húsini. Eftir at øll uppskotini eru komin inn, velur elstabólkurin besta uppskotið, og vinningurin verður eitt lekkurt páskaregg. Seinasta freist at koma við uppskoti er sunnudagin 3. apríl.

### Minibíbliuskúli og bønarmøti




Minibíbliuskúli er týskvøld í húsunum hjá Lívdini oman Hoydalar 28. Kvøldið verður skipað soleiðis, at frá kl 18.50–20.20 verður minibíbliuskúli, og frá kl. 20.30-22.00 verður bønarmøti. Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til samfelag, læru og bøn.

### Skráin fyri týskvøldini apríl 2011

**Týskvøldið 5. apríl**
Fortaping – avleiðing av synd (Dánjal Petersen)

**Týskvøldið 12. apríl**
Kyknubólkar

**Týskvøldið 19. apríl**
Fortaping – tørvurin á frelsu (Jógvan Z.)

**Týskvøldið 26. apríl**
Fortaping – lagna Satans (Høgni Johannesen)

### Til lukku við hjúnabandinum



Leygardagin 2. apríl giftust Gunnvá í Liða í Havn og Jóhannes Arge í Hoyvík. Vígslan var í fríkirkjuni Oasuni í Hoyvík.

### Samkomulega og dópur

Samkomulegan hjá Lívdini var á Zarepta vikuskiftið 11.- 13. mars undir heitinum "Gud hin Heilagi". Fleiri í samkomuni vórðu doypt á leguni. Tey vóru: Dánjal Lindenskov, Judith Lindarstein, Lillian Sjúrðardóttir, Karin Lamhauge, Gunn Danielsen, Súsanna Ludvig, Bjarki Magnussen, Niklas F. Jacobsen, Janus Ljósheim, Beinta Drewsen og Sólvá Viðstein.

*Myndir: Tonny Brimsvík*





# PÁSKAVIKAN

*Í páskavikuni verða hesi møtir í Lívdini:*

**Mánakvøldið 18. apríl kl. 20.30**
Evnið: Passiónin fyri dýrd Guds
– dømir templið (Oman Hoydalar 28)

**Týskvøldið 19. apríl kl. 20.30**
Evnið: Passiónin fyri æru Guds
– størsta boðið (Oman Hoydalar 28)

**Mikukvøldið 20. apríl kl. 20.30**
Evnið: Passiónin fyri fólki Guds
– grætur yvir Jerúsalem (Oman Hoydalar 28)

**Hóskvøldið 21. apríl kl. 20.00**
Evnið: Passiónin fyri sínum egnu
– páskalambið (Skúlin við Løgmannabreyt)

**Fríggjakvøldið 22. apríl kl. 20.00**
Evnið: Passiónin fyri vilja Guds
– krossfestingin (Skúlin við Løgmannabreyt)

## SKRÁIN FYRI MØTINI Í SKÚLANUM VIÐ LØGMANNABREYT

**Sunnudagin 3. apríl**

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Faðirhjarta Guds:<br>Videoinnslag v/ Unn Zachariassen |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Rós mítt er í Kristusi<br>(Róm. 15:14-21)<br>Talari: Jógvan Zachariassen |

**Sunnudagin 10. apríl**

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Myndarøð úr Chile:<br>Myndir frá Jónu Gunnarsson |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Longsulin at koma til Róm<br>(Róm. 15:22-33)<br>Talari: Jógvan Zachariassen |

**Sunnudagin 17. apríl**

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Myndarøð frá Kyrgyzstan:<br>Durita og Pauli Djurholm |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Passiónin fyri ríki Guds<br>– pálmasunnudag<br>Talarar: Jógvan Zachariassen<br>og Poul Guttesen |

**Sunnudagin 24. apríl**

| | |
|---|---|
| Páskamøti kl. 10.30 til uml. 11.45: | Evni: Passiónin fyri nýggja lívinum<br>– uppreisnarmorgun<br>Talarar: Jógvan Zachariassen<br>og Poul Guttesen |

**Ungdómstiltøk:**
Alive: leygarkvøld kl. 21.00


Unn


Jógvan


Jóna


Durita & Pauli


Poul

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*